# kil fyri fótbólti



farna kappingarári. Hann stóð á odda fyri B36, sum leingi var við í dystinum um føroyameistaraheitið. Í seinastu umførunum dragnaði árstalsfelagið í oddastríðnum. Men ta upplivingina kundi klaksvíkingurin væl verði fyri uttan.

Hann umhugsaði ofta sína støðu í felagnum, og tað var serliga takka verið ódugnaligu leiðsluni, sum hann greiðir frá.

- Eg var skelkaður, tá eg kom aftur. Leiðslurnar kunnu lýsast við einum orði: ein vanlukka. Teir krevja, at venjarin, sum brúkar tíð, pening og orku upp á venjaraútbúgving, skulu hava neyðugu pappírini. Men at sita í leiðsluni krevur einki. Tú skal ikki prógva nakað, og fleiri hava ikki skil fyri fótbólti. Men tað eru hesir, sum sita og stýra øllum. Venjarar fáa ikki stórvegis ávirkan á avgerðirnar, sum verða tiknar. Har má okkurt gerast. Eg skal heldur ikki lúgva og siga, at eg ikki ofta ætlaði at gevast sum venjari hjá B36 í fjør av hesu orsøk, slær Kurt Mørkøre fast.

Fyrrverandi landsliðsleikarin stendur nú við stýrisvølin hjá Elnesvågen, sum spælir í triðbestu norsku deildini. Liðið liggur í løtuni á fjórða plássinum, níggju stig eftir oddaliðið.

## Eingin klárað seg

Kurt Mørkøre var ongantíð av skjótastu leikarum. Við sínum ótrúliga máltevi og kropstyrki kláraði hann tó at standa seg millum teir bestu í norskum landskappingarfótbólti. Klaksvíkingurin dugir ikki at síggja nakran føroyskan fótbóltsleikara, sum hevði staðið seg í norskum fótbólti í dag. Hann vísir á toppskjúttan á landsliðnum, sum er í vanda fyri at flyta niður í triðbestu norsku deildina.

- Eg skal ikki siga, at fleiri høvdu kunnað klárað seg í toppinum í næstbestu og bestu deildini. Men sum tað er nú klárar eingin seg kropsliga, sum stórur dentur verður lagdur á her. Skulu føroyingar royna eydnuna í Noregi, so mást tú tola mótgang. Eg lesi á heimasíðuni hjá Hødd, at Rógvi Jacobsen hevur stórar trupulleikar, og ikki spælir serliga væl heldur. Tað hevði heldur ikki komið óvart á meg, um hann vendi heimaftur skjótt. Men nú kenni eg hann væl, og eg veit, at hann roynir. Men tað krevur nakað av tær, um tú skal standa teg her – ikki bara her, men allastaðni, sigur Kurt Mørkøre.

## Royna okkurt nýtt

Tað gekkst sera væl í hond hjá Kurt Mørkøre í norskum fótbólti. Í felagnum gekk hann undir eyknøvnunum "Kong-Kurt" og "Kurt Måløre". Við sínum mongu málum átti hann týðandi leiklut í, at Sogndal mánaðir seinni vann sær uppflyting í bestu deildina. Stuðulsleikarar á liðnum vóru eisini føroysku Julian Johnsson og Hans Fróði Hansen.

Tað er ikki serliga vanligt hjá føroyskum fótbóltsleikarum, sum hava rundað tey 30, at leita sær uttanlands at royna seg sum yrkisleikari.

Men hví valdi tú næstbestu deildina í Noregi framum gullveitslu í Klaksvík?

- Jákup í Stórustovu ringdi til mín eina dagin, og spurdi, um eg hevði hug. Og tað hevði eg. Hóast eg ikki visti, hvat felag talan var um. Tað kendist, sum eg gekk í somu skóm í Føroyum. Eg hevði roynt at vunnið føroyameistaraheitið, eg hevði roynt at vunnið steypakappingina. Tað vóru sum so ongar avbjóðingar eftir. Eg vildi royna okkurt nýtt. Tað kemur tó næstan ikki fyri í dag. Føroyingar vilja ikki troyta møguleikan. Óttin fyri, at tað miseydnast er væl størri enn viljin eftir, at tað eydnast. Tryggleikin er jú ov stórur í Føroyum. Hvat fara føroyingar ikki at siga og skriva, um tað ikki gongur? Gloym tosið, gloym skrivingina – tað ræður um at hava tol og stríðast fyri tí!, sigur Kurt Mørkøre í horninum úr Noregi.




**Føroyar eru næst vánaligasta landslið í Evropa. Vit hava ikki fingið nakað stig í hvørki EM- ella HM undankapping síðan 2004. Seinastu árini hava vit rapplað niður eftir styrkislistanum hjá FIFA. Í løtuni liggja vit nummar 195 – bara 12 lond eru aftan fyri okkum.**

**Sosialurin varpar komandi vikurnar ljós á keðiligu gongdina. Vit leita eftir orsøkunum til, hví tað gongur so illa í hond og spyrja hvat skal til fyri at venda óhepnu gongdini?**

**Lesið fjórða part í røðini um kreppuna í føroyskum fótbólti.**

**5. partur**



**Í blaðnum næsta hósdag verður prátað við Jákup í Stórustovu um sama evni**

